# Tá langomma var lekkur

**Kvinnur hava altíð pyntað seg. Eisini fyrr í tíðini. Vit ímynda okkum kanska, at formøður okkara bara gingu í grovum ullintum undirklæðum, sum prikaðu av skriðuni til. Men sum vit síggja her, vóru tær eisini pyntaðar og romantiskar fyri hundrað árum síðan. Munurin er bara, at meðan vit keypa innasta stásið í lingerihandlum, so vóru øll undirklæðini heimagjørd tá**

Úr gloymskunnar goymslum hevur Fornminnissavnið leitað okkum hesar dýrgripir fram. Forvitnisligu undirklæðini hava ongantíð áður verið sýnd fram alment.



*Mamelukkur: Víðar og hálvlangar undirbuksur við blondum á brókunum*
*Lív: Álíknað við nútímans topp*

Marsanna Petersen, etnologur á Fornminnissavninum, greiðir okkum frá um klæðini, sum umboða tíðarskeiðið beint uppundir og eftir næstsíðsta aldaskifti fram til áleið 1930. Klæðini eru hvít og úr bummull. Tey eru maskinseymað, mynstrini eru broderað ella heklað, og tað sæst týðiliga, at eitt stórt handarbeiði liggur aftan fyri. Fyri at halda klæðini rein var vanligt at kóka tey, og blánilsi varð nýtt fyri at varðveita hvíta litin.

– Hesi klæðini eru dømi um, at kvinnan gjørdi nógv burturúr klæðunum innanundir, sigur Marsanna Petersen, sum harmast um, at ongin hevur granskað í undirklæðum her á landi. Tí er ilt at siga, hvønn súmbolskan týdning tey hava havt.

– Vit á Fornminnissavninum eiga ikki slík klæðir til børn, og helst vóru hesi klæðini vanlig hjá ungum og eldri kvinnum, frá tí tær vóru kynsbúnar. Kvinnurnar hava helst sjálvar gjørt síni klæðir, sigur Marsanna Petersen.

Tá í tíðini gjørdu ungu genturnar nógv handarbeiði og útstýr, tað vil siga klæðir og brúkslutir, til sítt egna framtíðar húsarhald. Nakrar av kvinnunum, sum áttu klæðini, vit síggja her, hava verið »í húsi« uttanlands og her í Føroyum, og har lærdu og gjørdu tær nógv handarbeiði.

– Vit síggja eisini, at klæðini ofta eru bøtt og løgd út. Hetta gevur eina ábending um, at kvinnan nýtti klæðini yvir eitt langt tíðarskeið, og eisini tá ið hon var við barn. Fyrr var vanligt, at klæðir gingu í arv frá teim eldru til tey yngru. Men her tykist sama kvinna at hava nýtt plaggið ein stóran part av lívinum, tí monogram, oftast byrjanarstavirnir í for- og eftirnavni, eru eisini broderað í. So klæðini hava helst verið persónlig, sigur Marsanna Petersen, sum hevur lisið entologi í Lund í Svøríki.

Lagt til rættis: Rigmor Dam
Myndir: Sunva Eysturoy Lassen
Modell: Hildigarð Jakobsen
Location: Hoyviksgarður
Styling: Royal Hárfríðkan
Takk til Fornminnissavnið



*– Undirklæðini fyrr í tíðini vóru bæði vøkur, romantisk, hvít og natúrlig. Tey brúktu ongi kunstevni, boylar og elastikk, og listalig monogram vórðu broderað í*



*Serkur: Stuttur undirkjóli v/uttan ermum*



***– Í mammelukkunum er opið á báðum síðum, og í líningini eru smalir bendlar festir, til at knýta við***